# Minnir hetta ikki um sokallaðan "blackmail" ella prostitutión?



Val x

**EDMUND JOENSEN**
fólkatingsvalevni
Sambandsflokkurin

Tjóðveldi boðar frá, at tey fara til Danmarkar at halda uppboðssølu. Selt verður til tann sum bjóðar mest, líkamikið um boðið kemur frá høgru ella vinstru.

At ein føroyskur politiskur flokkur fer til Keypmannahavnar og roynir at selja seg sjálvan, er í sjálvum sær undrunarvert – eftir mínum tykki eisini ómoralskt. Men avgerðin er teirra.

Men tá Tjóðveldi uttan um Føroya Løgting fer til Keypmannahavnar og heldur uppboðssølu yvir politisk rættindi sum bert tilkemur einum greiðum meiriluta av Føroya fólki, so loyva vit okkum at rópa varskó.

Tað er forkastiligt at ein flokkur vanvirðir fyrst Føroya Løgting og haraftur-at føroyska fólkaviljan.

Hetta er eitt framhald av at draga avgerðir og mál niður á danska fólkatingið, sum hoyra heima á Føroya Løgtingi og hjá Føroya fólki.

Føroya Løgting avgerð til eina og hvørja tíð, og ger reglur fyri, hvussu farast skal fram landanna millum. Og tað er Føroya Landsstýri, sum skal útinna hesar avgerðir eftir teimum ásettu reglunum.

Hetta er als ikki eitt mál, sum Tjóðveldi av sínum eintingum kann taka við sær til Keypmannahavnar og bjóða til sølu til høgru og vinstru á Christiansborg.

Er eingin sum helst sjálvkritikkur skaptur í Tjóðveldinum? Tað undrar, at nakar kann finna uppá at siga sovorðið alment.

Tekur ein meiriluti av Løgtinginum avgerð um at loysa frá Danmark, og standa føroyingar aftanfyri hesa avgerð, so fáa vit loysing. Hetta hava skiftandi danskar stjórnir sagt og endurtikið eitt langt áramál.

Fyri stuttari tíð síðan var Høgni Hoydal í orðaskifti við danska statsministaran og kravdi loysing. Eina ferð enn fekk hann at vita, at um føroyingar ynskja loysing, so fáa vit loysing.

Statsministarin vísir á, at Høgni Hoydal minti hann um ein mann sum var við at bróta seg inn gjøgnum eina hurð sum stóð víðopin. Betur kann tað neyvan sigast.

Vit í Sambandsflokkinum fara á fólkating at røkja ta grundleggjandi uppgávu, at ansa eftir at øll mál, sum hava við føroysk viðurskifti at gera, fáa eina viðgerð sum tænir føroyskum áhugamálum best. Og hetta verður gjørt í positivum samstarvi við Venstre og restina av fólkatinginum.

Vit fara ikki at royna at "blackmaila" danskar flokkar og slettis ikki at selja okkara kropp til hægstbjóðandi danir. Okkara kroppur er føroyskur og hoyrir føroyingum til. Og vit kundu ikki droymt um at boðið avgerðir og rættindi til sølu í Keypmannahavn, sum er ein "suveren" ogn hjá einum meiriluta av Føroya fólki.

# Latið ei søguna doyggja



Val x

**JÓNLEIF JOHANNESEN**
Valevni hjá Javnaðarflokkinum
www.j.fo

Mangan verður samfelagið samanborið við eitt træ, har søgan er røturnar. Samanberingin er beinrakin, tí uttan søgu vóru eingi felagsvirðir. Og vóru eingi felagsvirðir, so var einki samfelag. Um vit í Føroyum ikki vilja læra av søguni, kunnu vit ikki uppbyggja eitt gott samfelag.

Jógvan Ravnsfjall skrivaði soleiðis í Sosialinum 31.10.07:

**"So kann man vera fyri ella ímóti einum valdømi, men søgan kemur einaferð at fella dóm yvir viðgerðina av hesum máli, og rokni eg við, at tann dómur verður til lítlan heiður fyri okkara løgting eins og partar av okkara fjølmiðlum, og harvið okkara demokrati".**

Eg eri so sera samdur við Jógvani í hesari niðurstøðu, og tíverri fær gjørd gerð ongan vend. Tó kunnu vit føroyingar vísa á, at hesin óvirðiligi dagur ikki var framdur við okkara vilja. Vit kunnu vísa okkara ónøgd við at geva javnaðarflokkinum okkara atkvøðu til Fólkatingi. Einasti flokkur á løgtingi, ið ikki tók undir við hesi dáragerð.

**"Latið ei søguna doyggja,<br>goymið hana so væl,<br>í dreingja sinni og moyggja<br>hon mikið útrætta skal",**

Vísið ábyrd<br>
Setið x við lista c

# Ríkt umhvørvi



Val x

**HEIDI PETERSEN**
fólkatingsvalevni
Tjóðveldi

Mítt hjartamál er at varpa ljós á umhvørvisspurningar og taka fulla ábyrgd við at luttaka í altjóða umhvørvissáttmálum - men minst til, tú mást velja fyrst.

Tjóðveldi hevur gjøgnum alt valskeiðið arbeitt fyri at fáa Føroyar at góðkenna Kyoto avtaluna.

Hetta eydnaðist nú í heyst, við løgtingssamtyktini um at taka burtur fyrivarni um Kyoto ískoytissáttmálan frá 11. desember 1997 til ST rammusáttmálan um veðurlagsbroytingar.

Hetta er í sjálvum sær eitt frambrot í føroyskum politikki, bæði tí hetta er ein viðurkenning av týdninginum at luttaka í altjóða avtalum, men eisini tí at um hetta málið finst ein breið semja. Tað vóru 26 atkvøður fyri málinum, ein ímóti og ongin blonk.

Tað sum síðani er hent í málinum er ein syrgisøga uttan líka. Tað útinnandi valdið, landsstýrið við løgmanni sum ábyrgdara, hevur ikki, vil ikki ella torir ikki at útinna tað sum løgtingið hevur álagt honum, nevniliga at boða ST frá um støðu okkara.

Og har liggur málið í dag, eitt sigursmál á tingi og fyri føroysku tjóðina, endaði í ráðaloysi hjá Føroya løgmanni.

Hetta eigur ikki at endurtaka seg, og mítt mál er at taka fulla altjóða ábyrgd í umhvørvismálum í Føroyum og á fólkatingi.

Men minst til, tú mást velja fyrst.

Les meira á www.tjodveldi.fo/heidi

# Neisti av hugsjón



Val x

**RODMUNDUR NIELSEN**
fólkatingsvalevni
Fólkaflokkurin

Vit kunnu óskammað leggja politiska verk okkara fyri dóm veljarans.

Seinastu trý árini hevur Fólkaflokkurin havt umboðan á Fólkatingi.

Umboð Fólkafloksins hevur har talað føroyinganna søk og verið loyalt mótvegis løgtingsmeirilutanum. Eitt verdugt og sakligt umboð.

Fólkatingsumboðanin er alt ov týdningarmikil til politisk solospæl hjá ávísum persónum.

Tað er avgerandi at tey mongu samfelagsmál, sum verða viðgjørd í Danmark, eiga talsmenn, sum viðurkenna politisku støðuna soleiðis sum hon er – við rættindum og skyldum.

Rættindini at loysa verandi og komandi spurningar í felag, og skyldur til sjálvi at fyriskipa egin viðurskifti. Tí er neyðugt, at hvør einstakur ger sær greitt, at øll fara á val, sum eiga í sær neista av hugsjón um verju av borgaranna rættindum, virkismøguleikum og virkisfrælsi.

Hinir flokkarnir vilja gera hetta valið til eina styrkiroynd millum andstøðu og verandi landsstýri.

Hetta hava vit einki ímóti. Vit kunnu óskammað leggja politiska verk okkara fyri dóm veljarans.

Eg vil at enda inniliga heita á øll fólkafloks fólk og annars øll onnur, sum vilja varðveita eina sømiliga rødd á fólkatingi, at halda fast um eina verduga umboðan.

Eitt fólkafloksumboð. Gott val.

# Og so kom hon eisini! Hali haloo, Randi í Jógvanstovu!



Val x

**RANDI Í JÓGVANSTOVU**
fólkatingsvalevni
Javnaðarflokkurin

Veit ikki hvat hon billar sær inn, stillar upp til Fólkatingsval. Sum ketta úr høvdatrog, slupur í skeggjunum, svøvnur í eygunum, nú má vera vell, sum sagt verður her um leiðir, í Leirvík also.

Nix, soleiðis spælir klaverið ikki. Vit í Javnaðarflokkinum bjóða okkum fram. Ikki bara fyri at vera klípir, men fyri at vera við til, at byggja tað góða samfelagið. Har onnur síggja forðingar, síggja vit loysnir. Har vit ikki sjálvi kunnu vera við, tí summi halda okkum vera ov "smá", virka vit fyri at "teir" finna tær loysnir vit vilja hava, stutt sagt, gera tað arbeiðið vit ynskja gjørt.Við Javnaðarflokkinum á Fólkatingi koma Føroyar víðari á øllum økjum.

"Praktiskt" samstarv er tann gongda leiðin, sambært forkvinnuni hjá Social demokratunum í Danmark. Tað kann eg meir enn so liva við. Vit í Javnaðarflokkinum síggja møguleikar, "praktiskar"? Whatever baby, teir "møguleikarnir" eiga at verða gagnnýttir føroysku tjóðini til frama. Vit vilja hava loysnir, ikki konfrontatión. Vit fara ikki niður á Danating fyri at vaska okkara skitnu klæðir, tað gera vit her heima.

Velji tí eitt av valevnunum til Fólkatingið av Javnaðarlistanum. Vit finna loysnirnar.

Út um bøgarðarnar saman við okkum í Javnaðarflokkinum, koma vit enn longri á leið.

Við vón um eitt gott val.

Lesið Sosialin -so eru tit við!